

# ISINA

Bólkurin "Isina" vid Donsk/Føroysku songkvinnuni Katrinu Petersen á odda tekur støði í fólkatónleiki, ið fyri tað mesta stava úr Svøríki og Bulgaria. Katrina Petersen hevur í mong ár fingið íblástur úr fólkatónleikinum, serliga tí Bulgarska, sum við sínum skeivu taktum, hvassa klangi og vakra lagið geva eina heilt serstaka uppliving. Afturat sær hevur Katrina nakrar av Føroya bestu improvisatorum.

**Manningin:**
Angelika Nielsen, violin
Leivur Thomsen, guitar
Mikael Blak, kontrabass
Rógvi á Rógvu, trummur



# VÁGSBOTNUR SOUTH AFRICAN JAZZ BAND

Bólkurin bleiv stovnaður til at spæla á Summartónum 2008, har eitt tema á festivalin var Suður Afrika.
Bólkurin spælir tónleik eftir suður afrikanskum komponistum, so sum Abdullah Ibrahim, Miriam Makeba og Johnny Dyani, og tónleik, sum annars hevur Afrika og afrikanskan tónleik sum íblástri.

**Manningin:**
Konni Kass, saxofon
Leivur Thomsen, gittar
Kristian Blak, klaver
Bárður Reinert Poulsen, bass
Jan Rúni Poulsen, trummur

# GUDMUND MORTENSEN

Organistur í Havnar Kirkju Gudmund Mortensen, spælir orgultónleik við dámi av fólkatónleiki:
Variatiónir av franska jólalagnum av Balbstre, Brúdleyps-marsjin úr "Ett Bondbryllup" av svenska tónaskaldinum Södermann, og fantasi yvir sálmalag úr Wales, skrivað av enska tónaskaldinum Waughan Williams "Rhosymedre".

